TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Byggifrøðingur til teknisku deild



## Tekniska deild

Tekniska deild hevur 12 starvsfólk í arbeiði og heldur til í posthús-bygninginum saman við byggi- og býarskipanar-deildini.

Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er m.a. at viðgerða byggimál, útstykkingarloyvi umframt at standa fyri planlegging, projektering og viðlíkahald av øllum kommunalu vegunum og tekniskum veitingum, ið kommunan hevur ábyrg av.

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

**Tekniska deild**
Tekniska deildhevur sum høvuðsuppgávu umsiting av heilsu- og umhvørvismálum, vegum og gøtum við hartilhoyrandi tekniskum veitingum sum kloakkir, vatnveiting og gøtuljós umframt umsiting av viðlíkahaldsarbeiði innan asfalt, ferðslu, reinhald, bussleiðini og TLS-skipanini um hendi.

Kommunan stendur fyri nógvum áhugaverdum anlegsarbeiðum og verður tí verður sóknast eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við starvsfeløgum og ráðgevandi vinnuni torir ella hevur hug at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Arbeiðsuppgávurnar**
eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við vegarbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirlit og byggirokniskapi í sambandi við veg- og anleggsarbeiði sum kommunan stendur fyri.

**Kommunan ynskir**
at tú skal hava útbúgving sum byggifrøðingur ella líknandi og skal hevur góðar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðugan førleika at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini, ið hoyra til Microstation, Microsoft Officepakkan og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Kommunan ynskir, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at málbera teg í skrift og talu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarbyggifrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara tlf. 302010.

**Umsóknir**
Saman við viðmælum, avrit prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. januar 2006. Viðmerk "Byggifrøðingur til teknisku deild".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Økispedagogur



Í dagrøktarskipanini í Tórshavnar kommunu eru áleið 130 børn, og 33 dagrøktarar arbeiða í skipanini.

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Dagrøktina í Tórshavnar kommunu eftir:**
- einum økispedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- vegleiðing av dagrøktarum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Tú er**
pedagogur, hevur royndir innan dagstovnaøkið, kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marjun Midjord, dagrøktarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. januar 2006.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



Í frítíðarskúlanum ganga 55 børn úr Eysturskúlanum eftir skúlatíð. 37 1.fl og 18 2.fl børn.
Á stovininum starvast 7 fólk.
Stovnurin hevur opið seinnapartar, arbeiðs-tíðin er frá kl 11 - 17.

## Frítíðarskúlan Smílibýlið eftir:
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 9. januar 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørg Danielsen, leiðara, tlf. 314879 / 214879.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Smílibýlið, Stoffalág 82, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. januar 2006.



Á stovninum eru 4 vøggustovustovur við 12 børnum í hvørjari stovu.

16 starvsfólk arbeiða á stovninum.

## Dagstovnin Sólareygað eftir:
- trimum pedagogum at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 15. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar 2006 eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Mirjam Johannesen , stovnsleiðara, tlf.302430.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Sólareygað, Sundsvegur 23, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi **mánadagin 23. januar 2006** til starvið, ið skal setast 1. februar 2006 og **mánadagin 13. februar 2006** til størvini, ið skulu setast 15. februar 2006.



Býlingshúsið hevur 3 stovur, har eru tilsamans 52 børn og 11 starvsfólk.

## Býlingshúsið millum Gilja eftir:
- einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir avtalu.
- einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.
- einum sjúkra- og feriuavloysara, ið kann arbeiða, tá ið tørvur er til tess.
- einari køkshjálp at arbeiða 15-20 tímar um vikuna at byrja 1. januar 2006 ella eftir nærri avtalu.

Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar 2006 eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Størvini sum pedagogar verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Starvið sum køkshjálp verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jónu Guttesen, stovnsleiðara, tlf. 318372.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum millum Gilja, Postboks 3165, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi **mánadagin 23. januar 2006** til pedagogstørvini og **hósdagin 29. desember 2005** til starvið sum køkshjálp.

- leys størv? Hygg á www.torshavn.fo